Meginfelag teirra, ið bera brek í Føroyum
Faroe Islands` Union for the Handicapped

Tórshavn tann
J. nr.
Viðgjørt ÁO
Tykkara j. nr.

Skuggafrágreiðing

Tann 13. mai 2009, samtykti Føroya Løgting, at ST-sáttmálin um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, skuldi vera galdandi í Føroyum.

Øll lond, ið hava samtykt ST sáttmálan, skulu fjórða hvørt ár senda eina frágreiðing til ST, har tey lýsa støðuna innan brek økið og, hvussu sáttmálin verður hildin.

Meginfeløgini innan brek økið í somu londum hava síðani møguleika fyri at ummæla og meta um, um londini liva upp til tað, ið frágreiðingar siga.

Í 2012, gott trý ár eftir, at Føroyar Løgting samtykti, at ST-sáttmálin skuldi verða galdandi fyri Føroyar, sendi Føroya Landsstýrið sína frágreiðing til ST saman við donsku stjórnini. Í sínari frágreiðing, vísir landsstýrið á, hvussu tey meta, at ST-sáttmálin verður hildin í Føroyum.

Í februar 2014, sendi MBF eina neyvt raðfesta skuggafrágreiðing til ST viðvíkjandi teinum økjum, har Føroya Landsstýrið ikki hevur tikið nøktandi stig til fult út at yvirhalda tað, ið Løgtingið hevur bundið seg til við at seta sáttmálan í verk.

Hvat er ein skuggafrágreiðing?
Skuggafrágreiðingin verður gjørd við støði í frágreiðingini hjá Føroya Landsstýri. MBF hevur mett um tað, ið Landsstýrið sigur í sínari frágreiðing. Síðani hevur MBF gjørt sínar viðmerkingar, heitt á ST- nevndina um, at mæla Landsstýrinum at seta ymisk viðurskiftir í verk.

Um meginfelagið ikki ger eina skuggafrágreiðing til ST- nevndina, vil frágreiðingin frá Landsstýrinum standa einsamøll og harvið kemur tann parturin, ið feløgini í MBF uppliva dagliga ikki fram nakrastaðni.

Skuggafrágreiðingin er gjørd eftir upplýsingum frá limafeløgunum í MBF. Arbeiðið uppá frágreiðingina, ið varð send til ST- nevndina í februar 2014, byrjaði longu á heysti 2012. Limafeløgini fingu øll áheitan um at senda tilfar til MBF. Síðani vóru fleiri formansfundir, har skuggafrágreiðingin var á skrá. Í august 2013, varð skuggafrágreiðingin send øllum limafeløgunum til viðmerkingar, áðrenn frágreiðingin varð týdd til enskt og spanskt.

Skuggafrágreiðingin varð løgd fram fyri ST nevndina í apríl 2014, og í september 2014, fekk MBF aftur møguleika fyri, at leggja fram fyri ST- nevndina.

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands
Mánadag – fríggjadag kl. 10 – 15
Tel: +298 317373
Fax: +298 310813
mbf@mbf.fo

Í báðum framløgunum varð ein topp trý listi nýttur, har trý tey mest átrokandi málini vóru tikin upp, hetta tí at tað er rættiliga sjáldan, at eitt land fær allar viðmerkingar við í niðurstøðunum frá ST- nevndini.

Hesaferð vóru vit so heppin, at vit fingu alt við.

Skuggafrágreiðingin frá 2014, var tann fyrsta skuggafrágreiðingin, ið MBF hevur sent til ST, og vóru vit saman við Danmark nr. 2 í øllum Norðurlondum, at senda inn frágreiðing til ST.

Longu komandi ár koma vit at arbeiða við okkara næstu skuggafrágreiðing, og tá skulu helst øll tilmælini frá niðurstøðunum úr ST verða sett í verk.

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands
Mánadag – fríggjadag kl. 10 – 15
Tel: +298 317373
Fax: +298 310813
mbf@mbf.fo